

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 07 - 2012

# Altjóða bankar álit á Faroe Petroleum

Faroe Petroleum - Nýggj lánsavtala stuðlar undir vøkstur Faroe Petroleum boðar frá, at felagið hevur undirskrivað eina hækkan av lánsavtalu, sum skal stuðla undir vøkstri felagsins. Lánsaavtalan, ið hevði eina staðfesta tilsøgn uppá US$ 125 mió., er nú tvífaldað til US$ 250 mió. (svarandi til umleið DKK 1.5 mia.). Lánið kann nýtast til kapitalíløgur, framleiðslukostnað og keyp av ognum. Lánsavtalan er eisini longd við einum ári fram til 30. juni 2017. Lánsavtalan hevur ein avskrivingarprofil, sum byrjar í juni 2014. Umframt teir seks bankarnar, sum vóru við í upprunaligu avtaluni, BNP Paribas, Lloyds TSB Bank plc, Commonwealth Bank of Australia, DnB NOR Bank ASA, Royal Bank of Scotland plc og SEB, er SR Bank við í tí longda og hækkaða láninum. Tann 30. juni 2012 hevði Faroe Petroleum umleið £ 103 mió. í tøkum peningi (svarandi til umleið kr. 950 mió.) umframt peningastreym frá olju- og gassframleiðslu, m.a. frá Blane, Brage, Njord og Ringhorne East. Felagið fegnast í tíðindaskrivi um nýggju lánsavtaluna og tann stuðul, ið bankarnir hava veitt felagnum. Nýggju lánsmøguleikarnir geva felagnum eitt gott grundarlag fyri framhaldandi vøkstri. Stjóri í Faroe Petroleum er Graham Steward. Tíðliga í morgn boðaði Faroe Petroleum frá fyribils úrslitinum av Cooper brunninum, sum felagið metir lovandi.